**Röða**
**forseta Íslands**
**Guðna Th. Jóhannessonar**
**til miðmála Tórshavnar Býráðs**
**Föroyum**
**17. mai 2017**

Kæru býráðslimir.
Aðrir góðir gestir.

Eg takki tykkum inniliga fyri góða móttöku her í Tórshavn, hövuðstaði Föroya. Mangt hava vit hjún sæð og mangt gott notið her í oyggjunum fögru. Vit hava eisini merkt týðiliga, hvussu nær vit íslendingar standa tykkum.

Sum sögufröðingur dámar mær avbera væl at síggja, at tit föroyingar leggja mikla orku í at rökja mentanararv tykkara. Tað er læruríkt fyri meg at síggja og hoyra, hvussu livandi hann er í allari samtíðarmentan tykkara, eittnú í tónleiki og aðrari list.

Í uppvökstri mínum var eg so heppin, at foreldur míni áttu eina plátu við Harkaliðnum. Meg minnist, hvussu stuttligt eg helt tað vera at lurta eftir kvæðinum um Ólav Riddararós. Omma í föðurætt dugdi íslendska sagnadansin, sum vit siga, og kvað stundum fyri mær – um Ólaf Liljurós sem reið með björgum fram: „Villir hann, stillir hann.“ Tað var so forvitnisligt at bera hetta saman við tað, sum Harkaliðið kvað. Föroyska kvæðið ljóðaði so undarligt og stuttligt í oyrunum á íslendskum dreingi: „Ungir kallar, kátir kallar! Gangið upp á gólv, dansið lystilig!“ [Unchir kallar, kvatir kallar, geingi úpp á gölvo dansi listílí] Og tað er stutt síðan, Harkaliðið við Anniku Hoydal á odda aftur sang og spældi fyri okkum íslendingum í Hörpu.

Síðstu árini hava íslendingar fingið hövi at njóta framförslurnar hjá fleiri föroyskum sangarum og tónleikarum. Eg veit, at listin er langur, men eg nevni bara Jógvan Hansen, sum vann fyrstu X-Factor kappingina í Íslandi, og Eivør Pálsdóttur, sum leitar sær íblástur í föroyskum kvæðum og sangarvi, men hon nýtir eisini íslendska sangarvin. Og so kann eg ikki lata verða at nevna tungmálmsbólkin “Týr”. Eg veit, at föroyingar vóru heldur ivasamir, tá ið tónleikabólkurin gav út Ormin Langa, sum Jens Christian Djurhuus yrkti fyri nærum tveyhundrað árum síðan, við tungum bassi, trummuslátti og grenjandi

ravmagnsgittara: „Glymur dansur í høll, dans – sláið ring! Glaðir ríða Noregsmenn til hildar ting.“ [Glymur dansur í höllu dans, slæji ring. Glæjir ruja Noregsmenn til hildar ting.]

Men kæru vinir! Soleiðis halda vit mentanararvin viðlíka, nevniliga við at lata hann vera livandi part av samtíðarmentanini. Tað gerst ikki við at læsa hann inni eins og vanvardan skartgrip, sum bara verður tikin fram á hátíðarstund. Heldur eiga vit at rökja, menna og ríka hann við at nýta hann á öðrvísi hátt, líta at honum úr nýggjum sjónarhornum og lata fríska lotið blása um hann.

Sama er galdandi fyri samfelag okkara. „Það er gott að elska,“ syngur Bubbi Morthens heima í Íslandi, og öll, sum ásttikin eru, kunnu taka undir við tí, uttan mun til stödd ella útsjónd. „Tað [Teð] er gott að elska“ syngur Signar í Homrum í Föroyum, og her kunnu öll syngja við. At byggja sterkt fólkaræðiligt vælferðarsamfelag er tað, sum vit norðurlendingar vilja. Her skal eingin detta niðurímillum, og vit taka okkum av sjúkum og gomlum, hjálpa teimum, sum bera brek – og standa saman. Hetta gera vit fyri hvört annað í okkara egna samfelagi, men vit vilja eisini hjálpa hvörjum öðrum í norrönu familjuni, tá ið ástendur. Samhug tykkar föroyinga hava vit íslendingar so sanniliga fingið at kenna fleiri enn eina ferð. Nú fylgjast vit við tykkum fram á leið. Bestu góðynski beri eg tykkum frá vinum tykkara, íslendingum.

Latum okkum reisast og rópa ferfalt hurrá fyri vinalagi og samvinnu föroyinga og íslendinga.